## Bayern tapti aftur

Annað vikuskiftið á rað tapti oddaliðið í týsku bundesliguni, Bayern München. Undan hesum báðum tapunum hevði Bayern München ikki tapt í 20 dystum. Sunnudagin spældi Bayern ímóti Stuttgart á heimavølli, men hóast Bayern legði seg á odda í dystinum, endaði tað við tapi. Dysturin endaði 2-1 til Stuttgart, og nú er stríðið um týska meistaraheitið uppaftur meira opið, enn tað hevur verið síðstu vikurnar.



## Roma eftir gullinum

Teir hava ligið eitt sindur aftanfyri og undirspælt sín leiklut, men eftir at AS Roma í gjár vann dystin ímóti italska toppliðnum, Inter, er Roma veruliga við í meistaraskapsstríðnum – bara eitt stig aftan fyri Inter. – Vit kunnu ikki longur fjala út yvir, at vit hava ambitiónir um at verða meistarar í Italia í ár. Tað er framvegis langur vegur, men nú er tað ein spurningur um vilja, sigur Claudio Ranieri.

# United og Chelsea draga frá

**Alt bendir á, at kappingin um gullið í Premier League kemur at standa millum Manchester United og Chelsea, sum vunnu stórsigrar um vikuskiftið, samstundis sum Arsenal bara fekk javnleik**



Hilmar Jan Hansen

Serliga Chelsea vísti óhugnaligan toppform, tá liðið knústi Aston Villa sundur við einum 7-1 sigri. Aston Villa hevur ligið framvið at fáa fjórða plássið, men sá ikki gott út leygardagin.

Frank Lampard var stóri spælarin hjá Chelsea, tí hann skoraði ikki færri enn fýra mál í dystinum, sum bara sá spennandi út fyrstu løtuna, tá John Carew javnaði fyri gestirnar til 1-1. Restini stóð Chelsa fyri við húð og hár.

Men hóast stórspæl, fekk Chelsea bara oddasessin til láns nakrar tímar leygardagin, til Manchester United slapp framat og vann ein greiðan 4-0 sigur á Bolton. Í fyrra hálvleiki var ikki nógv veiggj í, men eftir steðgin kom gongd á hjá United, sum fekk góða hjálp frá einum sjálvmáli, men annars takkaði fyri og tók av.

Arsenal, sum tvær ferðir er komið afturíaftur í stríðnum um enska meistaraheitið í vetur, datt enn eina ferð fýra stig aftur um Manchester United og Chelsea, tá tað bara gjørdist til javnleik 1-1 á útivølli ímóti Birmingham.

Uppaftur beiskari man tað kennast fyri The Gunners, at innskifti Kevin Phillips javnaði fyri heimaliðið í yvirtíðini…

### Premier League, úrslit

**Leygardagin**

| | |
|---|---|
| Birmingham-Arsenal | 1-1 |
| Chelsea-Aston Villa | 7-1 |
| Hull-Fulham | 2-0 |
| Tottenham-Portsmouth | 2-0 |
| West Ham-Stoke | 0-1 |
| Wolverhampton-Everton | 0-0 |
| Bolton-Man. United | 0-4 |

**Sunnudagin**

| | |
|---|---|
| Burnley-Blackburn | 0-1 |
| Liverpool-Sunderland | 3-0 |

**Í kvøld**

Manchester City-Wigan

### Premier League

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Man Utd. | 32 | 23 | - | 3 | - | 6 | 76 | 25 | 51 | 72 |
| 2 Chelsea | 32 | 22 | - | 5 | - | 5 | 82 | 29 | 53 | 71 |
| 3 Arsenal | 32 | 21 | - | 5 | - | 6 | 74 | 34 | 40 | 68 |
| 4 Tottenham | 31 | 17 | - | 7 | - | 7 | 57 | 29 | 28 | 58 |
| 5 Liverpool | 32 | 16 | - | 6 | - | 10 | 53 | 32 | 21 | 54 |
| 6 Man City | 30 | 14 | - | 11 | - | 5 | 55 | 39 | 16 | 53 |
| 7 Aston Villa | 31 | 13 | - | 12 | - | 6 | 43 | 32 | 11 | 51 |
| 8 Everton | 32 | 13 | - | 10 | - | 9 | 50 | 42 | 8 | 49 |
| 9 Birmingham | 32 | 12 | - | 9 | - | 11 | 33 | 37 | -4 | 45 |
| 10 Blackburn | 32 | 11 | - | 8 | - | 13 | 35 | 50 | -15 | 41 |
| 11 Stoke | 31 | 9 | - | 12 | - | 10 | 30 | 35 | -5 | 39 |
| 12 Fulham | 31 | 10 | - | 8 | - | 13 | 33 | 36 | -3 | 38 |
| 13 Sunderland | 32 | 8 | - | 11 | - | 13 | 41 | 50 | -9 | 35 |
| 14 Wolves | 32 | 8 | - | 8 | - | 16 | 28 | 50 | -22 | 32 |
| 15 Bolton | 32 | 8 | - | 8 | - | 16 | 36 | 60 | -24 | 32 |
| 16 Wigan | 31 | 8 | - | 7 | - | 16 | 29 | 59 | -30 | 31 |
| 17 West Ham | 32 | 6 | - | 9 | - | 17 | 38 | 55 | -17 | 27 |
| 18 Hull | 31 | 6 | - | 9 | - | 16 | 31 | 64 | -33 | 27 |
| 19 Burnley | 32 | 6 | - | 6 | - | 20 | 31 | 65 | -34 | 24 |
| 20 Portsmouth | 32 | 6 | - | 4 | - | 22 | 28 | 60 | -32 | 22 |

### Hondbóltur

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 20 | 16 | - | 0 | - | 4 | 643 | 543 | 100 | 32 |
| 2 Kyndil | 20 | 9 | - | 1 | - | 10 | 489 | 534 | -45 | 19 |
| 3 KÍF | 20 | 9 | - | 1 | - | 10 | 523 | 547 | -24 | 19 |
| 4 VÍF | 20 | 9 | - | 0 | - | 11 | 580 | 569 | 11 | 18 |
| 5 StÍF | 20 | 8 | - | 1 | - | 11 | 510 | 535 | -25 | 17 |
| 6 H71 | 20 | 6 | - | 3 | - | 11 | 528 | 545 | -17 | 15 |

## FAKTA

**VÍF-Neistin 27-29 (11-14)**
**10 min:** 2-4
**20 min:** 6-8
**40 min:** 19-17
**50 min:** 22-23
**Málskjúttar**
**VÍF:** Agnar Joensen 6, Karl Johan Djurhuus 4, Sámal Joensen 4 (2), Áki G. Olsen 4, Regin Joensen 3, Áki Olsen 3, Bjarki Hansen 2, Joen Pauli Høgnesen 1
**Neistin:** David Edvardsen 7 (4), Finnur Hansson 6, Heini Hanusarson 6, Jugoslav Djumic 5, Tróndur Kragesteen 3, Ingi Olsen 2
**Brotskøst:** VÍF 3, Neistin 5
**Útvísingar:** VÍF 2
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

**Kyndil-StÍF 26-15 (11-7)**
**10 min:** 3-2
**20 min:** 7-6
**40 min:** 15-9
**50 min:** 20-12
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Tummas Pauli Hanusarson 9 (3), Høgni Klein 6, Bárður Johannesen 3, Hans Áki Dal-Christiansen 3 (1), Josef Abrahamsen 2, Janus Einar Sørensen 1, Rani Ellingsgaard 1, Ken Zachariassen 1
**StÍF:** Bárður B. Danielsen 4, Leivur Justinussen 3, Cristian Preda 3, Suni Ernstsson 2, Marius Joensen 1, Høgni Jensen 1, Borgar Danielsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 4
**Útvísingar:** Kyndil 4, StÍF 2
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

**H71-KÍF 25-32 (11-16)**
**10 min:** 3-3
**20 min:** 7-9
**40 min:** 15-22
**50 min:** 20-28
**Málskjúttar**
**H71:** Dánjal Tórgarð 10 (3), Esbern Patursson 5, Poul Kjartan Dam 3, Janus Sørensen 3, Bárður Brimvík 2, Karolis Daynis 2
**KÍF:** Gert Hansen 9, Andrias Nielsen 6 (2), Niklas Reginsson 6, Ási Dam 5, Rógvi Weyhe 3, Tony Weyhe 2, Regin Petersen 1
**Brotskøst:** H71 4, KÍF 3
**Útvísingar:** H71 5, KÍF 9
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen

### Máltindurin, hondbóltur

| Atlantic Airways-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| David Edvardsen | Neistin | 159 (35) |
| Sámal Joensen | VÍF | 132 (43) |
| Dánjal Tórgarð | H71 | 122 (48) |
| Cristian Preda | StÍF | 115 (6) |
| Poul Kjartan Dam | H71 | 113 (15) |
| Bjarti Hansen | VÍF | 104 |
| Finnur Hansson | Neistin | 98 (11) |
| Jugoslav Djumic | Neistin | 96 (1) |
| Høgni Klein | Kyndil | 84 |
| Niklas Reginsson | KÍF | 84 (7) |
| Janus Sørensen | H71 | 81 |
| Bárður Johannesen | Kyndil | 80 (1) |
| Agnar Joensen | VÍF | 79 (7) |
| Ási Dam | KÍF | 77 (41) |
| Gert Hansen | KÍF | 76 (1) |